Tíðindabrævið
Hugin&Munin
Granskingarverkætlanin fyri Økismenning
Nr. 1 2003 4. árg.

# At flyta almennar stovnar

Seinastu árini hevur verið drúgt kjak í Føroyum um flyting av almennum stovnum, og harvið flyting av almennum arbeiðsplássum. Hetta kjak hevur í flestum førum viðgjørt spurningin um, hvørt almennir stovnar skulu flytast úr Tórshavn og út í ymisk øki í landinum. Seinastu árini eru eisini nøkur dømi um, at almen arbeiðspláss eru flutt úr høvuðsstaðnum (til dømis varð Skipaeftirlitið flutt til Miðvágs; umframt at Fíggjamálaráðið hevur flutt einstakar partar av umsitingin til Norðoyar og til Suðuroyar) ella at nýggj almenn arbeiðspláss eru løgd uttanfyri Havnina (t.d. Almanna- og Heilsuskúlin á Tvøroyri). Men hóast hetta kjak, so er ongin greið politiska linja løgd hesum viðvíkjandi. Einstakir politikarar hava tó ført fram, at allir nýggir almennir stovnar, skulu sum útgangsstøði leggjast uttanfyri Havnina. Meðan aðrir politikarar hava ført fram, at almennir stovnar skulu flytast út úr Havnini fyri á tann hátt vera við til at gera eina (búskaparliga) útjavning millum tey ymisku økini í landinum.

**Ikki bara í Føroyum**

Eins og í Føroyum, so er spurningurin um flyting av almennum arbeiðsplássum eisini partur av kjakinum í grannalondum okkara sum heild. Danska Erhvervs- og Boligstyrelsen hevur í hesum sambandi gjørt eina frágreiðing um flyting av almennum arbeiðspláss-um. Bakgrundin fyri hesi frágreiðing er hesin fyrispurningur frá Kristelige Folkeparti í Fólkatinginum í marts 2001: »*Har regering, i erkendelse af at antallet af statslige arbejdspladser i hovedstatsområdet er steget kraftigt, medens det er faldet i provinsen, overvejelser om udflytning av statslige arbejdspladser?*«.

Fyrispurningurin førdi seinni til, at álagt varð donsku stjórnini at gera eina frágreiðing um, hvussu verandi almennu stovnar kundu flytast úr Keypmannahavn, umframt at stjórnin eisini skuldi gera ítøkiligar ætlanir fyri at flyta eitt ávíst tal av almennum stovnum.

Frágreiðing, sum nevnist: *Udflytning av statslige arbejds pladser – Analyse*, varð liðug í mai 2002. Í frágreiðingini verða tikin upp evni, ið eisini eru áhugaverd í einum føroyskum høpi, og verður her gjørdur ein stuttur samandráttur av frágreiðingini, ið annars eisini fæst ókeypis á *Erhvervslivets Hotline tlf. +45 35 46 66 66* ella á www.ebst.dk» Udflytning av statslige arbejds pladser – Analyse«

Í frágreiðingini verður víst á, at spurningurin um at flyta almennar stovnum bæði fevnir um spurningin um, hvørjir almennir stovnar skulu flytast, og spurningin um, hvagar hesi stovnar skulu flytast. Afturat hesum kemur sjálvsagt spurningurin um, hví hesir stovnar skulu flytast, og hvat úrslitið av eini slíkari flyting væntandi kann verða.

Spurningurin um hví almennir stovnar skulu flytast, verður býttur í tveir partar:

- at flyta almennar stovnar fyri at líkastilla økið í landinum búskaparliga og hvat viðvíkur tilboðum á arbeiðsmarknaðinum (fjøltáttan av lokala arbeiðsmarknaðinum)
- at flyta almennar stovnar fyri at stimbra og menna eitt ávíst øki (í samstarvi millum almennar stovnar og lokalt vinnulív)


*Úti í Tinganesi*

Um almennir stovnar skulu flytast fyri at líkastilla ymisku økini í landinum búskaparliga, so hevur tað fyri so vítt ikki so stóran týdning, hvørjir almennir stovnar verða fluttir – í prinsippinum kann ein og hvør almennur stovnur flytast (undantikið í teimum førum har dagligt beinleiðis samband við landsstýrismannin er neyðugt). Harumframt er tað í slíkum høpi ikki neyðugt at kanna nærri í hvønn mun neyðugu førleikarnir eru at finna í økinum, sum almenni stovnurin skal flytast til. Fyri at meta um, hvørji øki hava tørv á eini búskaparligari útjavnan, er í frágreiðingini gjørd ein búskaparlig og demografisk lýsing av støðuni í teimum ymisku pørtunum í Danmark. Hendan lýsing verður ætlandi grundarlag undir hvagar stovnar skulu flytast, um stovnar verða fluttir fyri at minka um búskaparliga munin millum økini.

Um almennir stovnar skulu flytast fyri at stimbra, at eitt øki mennist, so hevur tað stóran týdning, at krøv verða sett til bæði økið, sum stovnurin skal flytast til, og til tann stovnin, sum verður fluttur. Í slíkum føri er tað ikki líkamikið, hvør stovnur verður fluttur, umframt at tað ikki er líkamikið hvagar hesin stovn-

*framhald á síðu 4*



# Grannastevna

**Ottar Brox, dr.scient**

Norsk institutt for by- og regionalforskning

*Nógv fiskavirki í Noregi mangla arbeiðsmegi. Hetta hevur m.a. havt við sær, at røddir hava verið frammi um, at tað skal gerast lættari hjá russarum at sleppa at arbeiða í norsku fiskivinnuni. Ikki øll halda hetta vera eitt gott hugskot. Millum annað er kendi norski samfelagsfrøðingurin og professarin Ottar Brox rættiliga ivingarsamur um hvørt hetta er besti mátin at loysa trupulleikarnar.*

# Útlendsk arbeiðsmegi(1)

Vit vita at nógvir russarar á Kola hálvoynni ikki hava nakað arbeiði, og at fiskivinnan í Finnmørkini altíð manglar arbeiðskraft. Og Finnmørkin – eins og restin av Noregi – hevur jú altíð tikið móti innflytarum, ið hava leitað eftir arbeiði – t.d. aðrar norðmenn eins og tamilar. Men onkuntíð er tað helst komið fyri, at gestablídni hjá myndugleikum er gingið út yvir upprunaligu íbúgvarnar.

Áðrenn vit lata Hagbart Nielsen og Brøðurnar Aarsæther heinta arbeiðsmegi í Murmansk, mugu vit royna at skilja, hvat tað er, sum hevur skapt vitleysu støðuna í fiskivinnuni í Finnmørkini. Tí man kann ikki kalla tað annað enn vitleyst, at vit við støði í heimsins ríkastu fiskastovnum ikki klára at skapa lønandi og lokkandi arbeiðspláss. Tað vil siga arbeiðspláss, sum eru góð nokk til, at ein partur av ungdóminum, sum veksur upp har fiskavirkini eru, eisini vilja arbeiða í fiskivinnuni og blíva búgvandi í økinum.

Í Finnmørkini er tað hent, at íbúgvarnir og tann grundleggjandi vinnan eru farin hvør sín veg: Fiskiskapur og -ídnaður í Finnmørkini mennist óheft av íbúgvunum í økinum, og hendan vinnan sær ikki út til at vera ein lokkandi møguleiki fyri ungdómin, sum nú veksur upp í økinum.

Hvussu er hendan støðan íkomin? Kvinnur og ung vóru sera áhugað í arbeiðsplássum í flakavinnuni, tá virkini av álvara vórðu sett á stovn í 1950unum. Men hóast hetta, so síggja dagsins ungu í nógvum fiskivinnubygdum og –býum í Finnmørkini burtur frá hesum størvum, tá tey umhugsa, hvat tey skulu miða eftir í teirra arbeiðslívi. Tað kann ikki vera nakar ivi um, at hesi arbeiðsplássini eru blivin munandi minni áhugaverd – tey eru dragnað í mun til aðrar vinnur ella onnur størv.

Hesi virkini hava altíð valt at seta gestaarbeiðarar í starv, heldur enn at laga seg í mun til lokala arbeiðsmarknaðin. Virkini eru nógva staðni fullkomiliga bundin av innfluttari arbeiðsmegi, ið kemur frá støðum, har arbeiðsmøguleikarnir kunnu vera sera vánaligir. Gjøgnum arbeiðsmarknaðarráðið og á aðrar mátar, hevur staturin stuðlað hesum innflutningi, soleiðis, at ídnaðurin ikki hevur havt tørv á at menna seg í samlag við arbeiðaramentina og – lønina á staðnum. Ella fyri at siga tað á annan hátt: Myndugleikarnir hava brúkt almennar pengar og innflytarar soleiðis, at ídnaðurin er sloppin undan at laga seg til tað lønarlag og tey arbeiðsviðurskifti, ið lokalsamfelagið krevur.

Tað er rættiliga avmarkað, hvussu nógv hendan gongdin hevur verið frammi alment, men tað er við at koma tað, ið lærubøkurnar kalla »búskaparlig dualisma« í Finnmark. Hetta kann hava við sær, at grundleggjandi ídnaðurin verður ein vinna, sum ikki kann yvirliva vanliga norska støðið viðvíkjandi løn og arbeiðsviðurskiftum.

Tann almenna fatanin av tí, sum fer fram, bleiv sjónlig í sjónvarpinum fyri nøkrum árum síðani, tá ein fyrrverandi forsætisráðharri *moraliseraði* um, at íbúgvarnir í Finnmarkini ikki fingu sær starv í fiskiídnaðinum. Tað sama síggja vit nú *Arbeidsdirektøren* hugleiðir um at orsøkin til ósettu størvini í Strandar-Noregi er vantandi mentanartilboð, ið fáa fólk at streyma til býirnar.

Nú eru nakrir stjórar í fiskivinnuni farnir at vera ónøgdir við teir tamilar, ið hava verið her longst. Tey hava lært seg at tosa norskt og eru vorðin ein partur av norska samfelagnum soleiðis, at tey duga at brúka bæði fakfeløgini og aðrar óformellar hættir at náa sínum áhugamálum mótvegis leiðsluni. Hetta er jú gott, tí vit vilja jú hava integration. Men ikki allir stjórarnir halda hetta vera gott, og tí hava teir sett fram krøv um at fáa *nýggjar* bólkar- sum t.d. desperatar russarar – til at fylla tey tómu plássini í flakahøllunum.

Tað er í sær sjálvum gott at geva flóttafólki møguleikar at arbeiða í Noregi, og vit hava øll gott av, at Noreg verður eitt meira litríkt samfelag (hóast flestu russar í stóran mun líkjast norðmonnum). Men vit mugu ansa væl eftir, at vit ikki brúka fátøk fólk úr øðrum londum til at skapa størri sosialar og búskaparligar munir í Noregi – ella til at varðveita arbeiðspláss, sum ikki liva upp til norskt lønarstøði og arbeiðsviðurskifti

Uppskotið at loysa trupulleikarnar hjá Hagbart Nilsen við russarum er líka ivasamt sum hugskotið at seta fátækar bøndur úr triðja heiminum í staðin fyri norskar bøndur. Tí tá høvdu vit verið noydd at syrgt fyri, at teir ikki blivu integreraðir, tað vil siga, at teir ikki fáa førleika at taka á seg onnur størv, sum nógvir av teirra undanmonnum á gørðunum hava gjørt. Tá vildi tann jørðin, sum teir skuldu dyrkað, skjótt ligið ónýtt aftur, og vit vildu verið í somu støðu, sum áðrenn vit innfluttu hesar bøndur. Vit eiga ikki at menna ein »kastu-búskap« í hesum landi við etniskum bólkum, ið eru innilæstir hvør í sínari vinnu ella størvum. Hetta vildi jú verið størv, sum norðmenn fóru frá, tí størvini blivu gjørd alt minni lokkandi orsakað av nýtsluni av innfluttari arbeiðsmegi frá fátøkum londum.

Tað kann gevast pláss fyri nógvum innflytarum í norskum arbeiðslívi, kundi Jagland sagt okkara vini í Finnmørkini. Men skulu teir veruliga *integrerast*, mugu vit ikki loyva, at tey verða brúkt at niðurgradera fak og yrki.

*(1) Greinin er fyrr prentað í Ny Tid, 6. nov. 1998*

# Tey fyrstu trý árini

Vit vóru til døgurða á einari framúr góðari matstovu í Klaksvík. Endamálið var at visa teimum norsku eftirmetarunum av Granskingardeplinum fyri Økismenning lokalt gestablídni, samstundis sum kvøldið skuldi markerað, at mítt skeið sum stjóri á Granskingardeplinum fyri Økismenning var komið at enda. Rani Nolsøe, ein av stigtakarunum til granskingardepilin, var vitandi um ta fyrru orsøkina, men gjørdist rættuliga bilsin, tá vit byrjaðu at tosa um “ tey fyrstu trý árini” hjá granskingardeplinum. “Tað eru ikki longu trý ár?”. Jú, tað eru trý ár! Tíðin gongur skjótt, tá ið arbeitt verður við hugtakandi evnum.



*Klaksvík*

Vit hava arbeitt við at byggja upp ein stovn frá grundini. Klaksvíkar kommuna hevur víst okkum vælvild, hvat viðvíkur hølisviðurskiftum í teirri gomlu politistøðini, og Vágs kommuna hevur stuðlað skrivstovu okkara í Suðuroynni, í Vági. Nógv av tíðini tað fyrsta árið fór við at byggja upp neyðugu netverkini, sum eru grundarlag undir granskingini og okkara dagliga samskifti. Tveir okkara vitjaðu tað fyrsta hálva árið 22 kommunur, á 15 av teimum 17 bygdu oyggjunum. Við hesum varð skapt eitt landsfevnandi stuðulsnetverk, sum hevur verið grundarlagið fyri arbeiði okkara síðani.

Afturat hesum, so er nógv orka brúkt uppá at skapa innanlendis og uttanlendis sambond við aðrar stovnar. Sambond eru knýtt við Fróðskaparsetrið, bæði hvat viðvíkur gransking og undirvísing. Hartil hava vit samstarvað við m.a. Føroya Fiskaaling, umframt at Hagstova Føroya hevur víst vælvild í einstøkum verkætlanum. Á heysti í 2001 samskipaði Gestur Hovgaard eitt skeið um økismenning á Søgu- og Samfelagsdeildini á Fróðskaparsetrinum, har umframt Gestur eisini Bjarni Mortensen, Dennis Holm og Ólavur Waag Høgnesen hildu fyrilestrar.

Granskingardepilin fyri Økismenning hevur eisini staðið fyri einstøkum umbidnum kanningum, ein teirra umbiðin av Føroya Lærarafelag. Frágreiðingin, »Limakanning hjá Føroya Lærarafelag«, viðger hvussu tað er at vera lærari í Føroyum í dag. Bjarni Mortensen skipaði hesa kanning, og luttóku eisini Dennis Holm og Gestur Hovgaard í hesum arbeiði, og Ólavur Waag Høgnesen rættlas.

Á vári í 2002 skipaði Granskingardepilin fyri Økismenning eitt seminar um, hvør leikluturin hjá føroysku kommununum skal vera í framtíðini. Seminarið var ætlað kommunalpolitikarum og kommunalu umsitingunum. Løgmaður, Anfinn Kalsberg, setti seminarið, sum varð hildið á Hotel Føroyum í mars mánaða. Á seminarinum vóru bæði framløgur, kjak og bólkaarbeiði. Tilsamans vóru sjey framløgur hildnar av norskum, íslendskum og føroyskum granskarum; framløgurnar viðgjørdu evni sum t.d. skipan av føroysku kommunum í framtíðini, kommunualt samstarv í Føroyum, kommunusamanlegging í Íslandi, lokalur menningar-politikkur í Norra, umframt royndir við smærri kommunum í Norra. Fleiri enn 80 luttakarar vóru á seminarinum, og vístu nógvir luttakarar á, at talan var um eitt gott seminar við góðum framløgum og góðum kjaki.

Starvsfólkini á Granskingardeplinum fyri Økismenning hava harumframt knýtt fleiri altjóða sambond, sum eisini fara at verða partur av framtíðar granskingarverkætlanum á granskingardeplinum. Í 2000 luttóku starvsfólkini á einum Norður Evropeiskum seminari um *Regional Governance in Northern Europe*, og varð úrslitið av hesum ein størri framløga í Norðurlandahúsinum á heysti í 2000. Í 2001 luttók Gestur Hovgaard, sum er tilknýttur Dalhousie University í Halifax (við einum sokallaðum *postdoc* stipendium), á *The Inaugural Research Conference and Annual General Meeting of AquaNet*, í Halifax, Kanada. Ólavur Waag Høgnesen legði fram arbeiðsrit um føroysku alivinnuna á *The Inaugural Conference for the Center for Maritime Research (MARE)* í Amsterdam. Bjarni Mortensen luttók á *The Sixteenth International Seminar on Marginal Regions* í Volda, Norra, har hann legði fram arbeiðsritið »Municipal Changes in the Faroes«, sum hann hevur skrivað saman við Dennis Holm. Fyri at víðkað um altjóða netverk okkara, hava vit eisini skipað fyri fleiri fyrilestrum kring landið, har útlendskir granskarar hava lagt fram granskingarúrslit eins væl og praktiskar royndir frá londum í øllum heiminum.

Granskingararbeiðið á granskingardeplinum hesi trý árini hevur fevnt um trý høvuðsevni. Fyrst hava vit givið út tíðarritið Hugin & Munin, sum verður sent kommunum, sum stuðlað granskingardeplinum, umframt miðsnámsskúlum og øðrum áhugaðum. Tíðarritið Hugin & Munin viðger viðurskifti og royndir úr grannalondum okkara, sum hava lokalan áhuga í Føroyum, umframt at ein gestaskrivari leggur fram sjónarmið á »Grannastevnuni«, ið er at meta sum ein kronikk. Hugin & Munin kemur út fýra ferð um árið.
Granskingardepilin gevur eisini út Smárit, sum útlendsk-

*framhald á síðu 4*

# Tey trý fyrstu árini - *framhald*

ir granskarar, ið hava vitjað Granskingardepilin og hildið fyrilestrar í Føroyum, hava skrivað. Smárit eru í flestum førum skrivaði á enskum. Afturat hesum gevur granskingardepilin eisini út Arbeiðsrit, ið eru ávegis granskingarúrslit ella frágreiðingar, sum eru skrivaðar á føroyskum. Ein onnur útgáva er Námsrit, ið eru ætlað sum undirvísingartilfar í eitt nú miðnámsskúlunum.

At enda er stór orka løgd í tríggjar størri granskingarverkætlanir, ið verða givnar út í trimum bókum. Úrslitið av teirri fyrstu verkætlanini, ið viðger búskaparmenningina á útvaldum støðum í Føroyum seinastu ártíggini, varð givið út í bókini *The Restructuration of the Faroese Economy*, sum kom út í februar í ár. Bókin er skrivað á enskum, og ein føroysk útgáva av hesum arbeiði er ávegis og verður væntandi givin út fyrst í komandi ári. Næsta verkætlanin viðger ymisk viðurskifti viðvíkjandi føroysku kommununum. Úrslitið av hesari verkætlanini verður givið út í ensktmæltari bók á sumri 2003. Evnið í triðju verkætlanin er »*Ungdómur*«, og sum partur av hesi verkætlan verður í løtuni arbeitt við eini verkætlan um rekruttering til fiskivinnuna, har útbúgving og vinnuval hjá ungdóminum verða kannað í eini størri spurnarblaðskanning.

Nú eg sum ætlað fari úr starvi við árslok, so vil eg nýta høvið at takka nøkrum einstaklingum og nøkrum stovnum fyri teirra leiklut í at skapa karmar um Granskingardepilin fyri Økismenning. Jógvan við Keldu og Steinbjørn Jacobsen, borgarstjórar í Klaksvík, umframt Klaksvíkar býráð og starvsfólk í umsitingini, sum hava veitt okkum stóran stuðul. Hans Trygve Teirin, sum seinastu trý árini hevur veitt mær góða ráðgeving um føroyska lóg og føroyska umsiting. Eisini skal ein tøkk og ein heilsan verða send Norðoya Sparikassa og báðum stjórunum, Jóannesi Poulsen og Eyðfinni Reyðberg, fyri teirra tolsemi og stuðul. Einamest vil eg takka Egil Olsen fyri leiklut hansara í Stýrinum fyri Granskingardepilin fyri Økismenning, har hann hevur verið stýrisformaður tey seinastu tvey árini. Egil hevur verið ein íbirtandi leiðari og ein áhaldandi stuðul.

*Halifax, Kanada*
*Richard Apostle*

# At flyta almennar stovnar - *framhald*

ur verður fluttur. Helst skulu samvirkandi fyrimunir verða millum funktiónina hjá stovninum og vinnuvirksemi í økinum. Víst verður í frágreiðingini á, at einstøk øki í Danmark eru vorðin serkøn innan ávísar vinnur, t.d. er tekstil og klædnaídnaður í Mið-Jútlandi; offshore-vinnan í Esbjergøkinum; møblaídnaður í Sallingøkinum, og fartelefoni og satelitkommunukation í Norður-Jútlandi. Hetta merkir eisini, at tað er meiri náttúrligt at flyta t.d. partar av oljumálaráðnum til Esbjergøkið, enn tað er flyta tað til eitt nú Norður-Jútland. Um t.d. oljumálaráðið varð flutt til Esbjerg, so hevði tað givið møguleika fyri at styrkt uppaftur meiri um førleikan innan oljuvinnan í økinum. Somu viðurskifti høvdu gjørt seg galdandi fyri onnur øki og aðrar vinnur, verður mett í frágreiðingini.

Í frágreiðingini verður annars sum heild víst á, at kannast má, hvørt økið, ið almenni stovnurin skal flytast til, er ført fyri at nøkta tørvin, sum tann almenni stovnurin hevur. Hetta er bæði galdandi fyri møguleikan fyri at fáa nýggj starvsfólk, fyri at fáa neyðugu tænasturnar, umframt møguleikar fyri at húsa starvsfólkum, ið velja at flyta við stovninum. Í frágreiðingini verður mett, at tað bert eru størri býarøkini í Danmark, ið eru før fyri at nøkta hendan tørv – og av somu orsøk verður mett, at almennu stovnarnir bert kunnu flytast til hesi býarøki.

Hvat tí fíggjarliga partinum viðvíkur, so verður í frágreiðingini víst á, at ávísar fíggjarligar avleiðingar kunnu standast av at flyta almennar stovnar. Fyrst og fremst standast útreiðslur av, at ein nýggjur stovnur skal setast á stovn í einum nýggjum øki, umframt at tað eisini eru ávísir kostnaðir í smb. við sjálva flytingina. Men eftir at stovnurin er fluttur, er tað sannlíkt, at tað fara at vera ávísar sparingar í rakstrinum, tí at húsaleigan er lægri uttan fyri høvuðsstaðarøkið. Hinvegin kann væntast, at ferðaútreiðslurnar verða øktar nakað. Sostatt er tað trupult at siga, um tað sum heild eru fíggjarligir fyrimunir ella vansar við at flyta almennar stovnar, tí í summum førum vil talan vera um eina sparing og í øðrum førum vil talan vera um eina økta útreiðslu.

# Útgávur

**Smárit 9/2003**
Fyrsta útgávan í 2003 er Smárit Nr. 9. Smáritið er skrivað av Stuart Black, sum er deildarstjóri í skotska *Highlands and Islands Enterprise* www.hie.co.uk. Smáritið ber heitið "*The role of Highlands and Islands Enterprise in Community Development*" og er skrivað á enskum. Stuart Black vitaði í september 2002 Granskingardepilin fyri Økismenning og helt í hesum sambandi almennan fyrilestur í skúlanum í Funningsfirði. Fyrilesturin var væl vitjaður og fólk vístu stóran áhuga í kjakinum.

Útgevari:
**Granskingarverkætlanin fyri Økismenning**
Jústagøta 1
**Postadressa:**
Postboks 159
700 Klaksvík
Tlf. 457744 & Fax 457743
Suðuroy: Tlf. 37 44 77
E-postur: region@region.fo
Heimasíða: www.region.fo
**Ábyrgd:** Dennis Holm og Bjarni Mortensen
**Umbróting:**
Miðil, Klaksvík
**Prent:**
Hestprent